

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Vit sóknast eftir skrivstovufólki – manni sum kvinnu – at byrja sjótast til ber.**
**Arbeiðið er roknað til hálva tíð, men møguleiki er eisini fyri øðrum arbeiðstíðum.**

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Løn:**
- sambært avtalu

**Umsókn:**
- Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi innan 10. mai

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur skrivstovuútbúgving ella hevur royndir á økinum
- at tú ert ágrýtin og vandin
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni

- Talan er um fast starv, men til ber eisini at søkja starvið sum avloysari

Meiri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen á 35 36 11 ella 21 81 15, ella á hedin@hdygd.fo

H DYGD

í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*HDYGD er samtak hjá Vatnsoyra Snikkaravirki spf. og Føroya Glugga pf. Vit smíða vindeygu og hurðar úr træ, træ/alu og plasti. Í løtuni eru 25 starvsfólk, harav 5 eru í umsitingini.*

REPROZ



# BÓKHALDARI

**Vit sóknast eftir bókhaldara – manni sum kvinnu – at byrja sjótast til ber.**
**Arbeiðið er roknað til hálva tíð, men møguleiki er eisini fyri øðrum arbeiðstíðum.**

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Løn:**
- sambært avtalu

**Umsókn:**
- Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi innan 10. mai

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert útbúgvin í bókhaldi ella hevur royndir á økinum
- at tú ert ágrýtin og vandin
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni

**Royndir:**
- royndir í Concorde C5 bókhaldsskipanini geva fyrimun, men eru tó ikki nøkur treyt

- Talan er um fast starv, men til ber eisini at søkja starvið sum avloysari

Meiri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen á 35 36 11 ella 21 81 15, ella á hedin@hdygd.fo

H DYGD

í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*HDYGD er samtak hjá Vatnsoyra Snikkaravirki spf. og Føroya Glugga pf. Bókhaldið er tó ikki felags. Vit smíða vindeygu og hurðar úr træ, træ/alu og plasti. Í løtuni eru 25 starvsfólk, harav 5 eru í umsitingini.*

REPROZ

# Fíggjarleiðari til Strandfaraskip Landsins

Kanst tú stýra búskapinum? Dámar tær avbjóðingar? Ert tú ein góður leiðari?

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum og dámligum fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt, nú okkara fíggjarleiðari hevur tikið við nýggjum avbjóðingum í føroyska vinnulívinum.

**Starvið**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av og skipar fyri fíggjarstýringini og roknskaparhaldinum á Strandfaraskipum Landsins. Fíggjarleiðarin er partur av leiðslubólkinum og vísir beinleiðis til stjóran.

**Umsøkjarin**
Tú hevur útbúgving og royndir innan fyri fíggjarstýring og/ella roknskap. Royndir við fíggjarstýringsskipanini hjá Navision og kunningartøkni annars eru ein fyrimunur. Vit vænta, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, og royndir í prosjektleiðslu eru ein fyrimunur. Tú arbeiðir analytiskt og málrættað, og tú megnar at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Leiðarin hevur stóra ávirkan á egin viðurskifti og menningina av Strandfaraskipum Landsins.

Starvið er lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannstarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, stjóra, ella Niels Juel Arge, fíggjarleiðara, á telefon 34 30 00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. mai 2007 kl. 12:00, og skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Páll Heinesen
Yviri við Strond 4
Postboks 88
FO 110 Tórshavn

Ella teldupost: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

